# Nýtt lemmavirki í Vági

*Fyritøkan Injector Door, sum ger serligu trollemmarnar í Vági, fer at byggja tvær nýggjar framleiðsluhallir*

EDVARD JOENSEN

**Vágur:** Formarnir til fundamentið undir fyrru framleiðsluhøllina, sum lemmavirkið Injector Door skal byggja í Vági, eru settir upp.

Injector Door fer at byggja tvær framleiðsluhallir, sum tilsamans fara at vera 2.000 fermetrar, umframt ein skrivstovubygning. Øll verkætlanin fer at kosta einar tríggjar milliónir krónur, sigur Lars Larsen, stjóri í Injector Door.

Hann sigur, at byggingin verður tikin í stigum. Talan er um at gera tvær hallir. Onnur skal verða 750 fermetrar stór, og hin skal verða 1.250 fermetrar.

Fyrst verður tann minna høllin gjørd, og virksemið flutt í hana, beinanveg, hon er liðug. Tað eru fundamentini til hana, teir nú fara undir at stoypa.

Lars Larsen sigur, at teir hava valt at gera tvær stálhallir, sum settar verða niður á betongfundament., Tað var tann bíligasta loysnin, sigur hann. Teir ætla at gera ta minnu høllina sjálvir, meðan helst verður neyðugt at fáa onkran annan at gera ta størru, sigur hann.

Nýggju hølini fara at betra arbeiðsumstøðurnar heilt munandi, sigur stjórin á Injector Door. Sum er, arbeiða 18 mans í leigaðum hølum inni á gamla Polarfrost. Men nýggju hallirnar fara als ikki at kunna samanberast við hesar umstøðurnar, sigur hann.

Felagið ger serligu trollemmarnar, sum Helgi Larsen í Vági hevur uppfunnið. Teir eru gjørdir eftir somu skipan sum veingirnir á flogførum, og spara tí skipinum rættiliga fitt av orku.

Teir hava nokk at gera í smiðjuni, sigur stjórin. Teir hava arbeitt í skiftum, tá á hevur staðið.

Lars Larsen sigur, at teir higartil hava útflutt lemmar til fleiri lond. Og tað er víða í heimi. Heilt til New Zealands og Chile hava teir selt trollemmarnar. Umframt allastaðni her á okkara egnu leiðum. Øll Norðanlond uttan til Finlands. Stóra Bretland, Írland, Týskland. Og longri burtur sum Portugal, Grønland og USA er støð, sum lemmarnir eru seldir til, sigur Helgi Larsen.



*Byrjað er upp á fundamentið til nýggja lemmavirkið hjá Injector Door í Vági*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Fáa nú barnaansing í Sumba

*Sumbiar Kommuna samtykti á fundi mánakvøldið at seta kommunala dagrøkt á stovn*

EDVARD JOENSEN

**Sumba:** Tey børn, sum hava tørv á at verða ansað kommunalt í Sumbiar Kommunu, fáa nú skjótt eisini møguleikan. Bygdarráðið samtykti á fundi mánakvøldið at fara undir kommunala dagrøkt.

Jacob Vestergaard, bygdarráðsformaður í Sumbiar Kommunu, sigur, at kommunan hevur kannað tørvin á kommunalari barnaansing við tí fyri eyga at gera barnagarð. Men tað vísti seg, at tørvurin var so lítil, tá saman um kom, at tað er púra óneyðugt við barnagarði, sigur hann. Í grundini er tørvurin so lítil, at ein kommunal dagrøktarskipan við leiðara og øllum, sum til hoyrir, eisini er í meira lagi.

Bygdarráðsformaðurin sigur, at tað eru møguleikar í lógini, sum gera, at til ber at seta eina einstaka dagrøktarmammu at passa børnini, Tey eru ikki fleiri enn so, sambært kanningini hjá kommununi, enn at ein dagrøktarmamma er nokk.

Hinvegin er tað møguligt at samstarva við aðrar kommunur, sum hava skipaða dagrøkt, sigur Jacob Vestergaard, bygdarráðsformaður í Sumbiar Kommunu.

Tað er annars lítð av virksemi í Sumba, sigur Jacob Vestergaard. Eitt saltfiskahús var, men har er einki arbeiði longur. Kommunan hevur nú keypt húsið, og ætlanin er at nýta tað til ymiskt kommunalt virksemi. So sum skrivstovu og goymsluhøli hjá Sumbiar Kommunu.

Sumbiar Kommuna hevur higartil havt skrivstovu í skúlanum í Sumba. Men har er plásstrot, so hildið hevur verið rætt, at skúlin fær tað, hansara er, meðan kommunuskrivstovan fær sítt.

Okkurt skal gerast í hesum sambandi, sum fer at kosta eitt sindur av pengum. Men tað verður ikki gjørt, fyrr enn nýtt bygdarráð, sum valt verður í heyst, hevur tikið við, sigur Jacob Vestergaard, bygdarráðsformaður í Sumba.

Annars arbeiðir Sumbiar Kommuna við at fáa nýggja bakkaverju fram við fjøruni í Sumba. Har minkar alsamt burtur av.

Jacob Vestergaard sigur, at teir hava fingið Matrikulstovuna at mála upp, hvussu støðan er í mun til tað, sum var, tá Sumbiarbygd varð matrikulerað. Tað vísir seg, at í støðum eru upp til 17 metrar av bakkanum tiknir burtur av brimi. So tað er greitt, at her má okkurt gerast, sigur bygdarráðsformaðurin.

Men tað kostar eisini pengar, og Sumbiar Kommuna hevur fyrr søkt landsstýrismannin í vinnumálum um pening av havnarjáttanini, men ikki fingið nakað játtað. Teir gevast tó ikki við tí og hava søkt aftur, sigur Jacob Vestergaard, bygdarráðsformaður, sum væntar, at nú man fara at bera til.

# Nýggj rørleiðing í Botni

*Rørleiðingin , sum veitir vatn úr Ryskivatni til elverkið í Botni, verður skift út. Arbeitt verður fyri einar ellivu milliónir krónur*

EDVARD JOENSEN

**Í Botni:** Tann 44 ára gamla rørleiðingin úr Ryskivatni oman í Botn vestantil á Suðuroynni, verður nú skift út. Samstundis verður elektroniska og elektriska útgerðin inni á verkinum í Botni eisini skift.

Bjarki Hermansen, verkmeistari hjá elfelagnum SEV, sigur, at rørini, sum nú verða løgd, eru stálrør, sum eru 60 sentimetrar í diametur. Tey koma í staðin fyri stálfóðra betongrør, sum hava ligið síðan 1956.

Tann fyrsta rørleiðingin varð løgd í 1921, sigur Bjarki Hermansen.

Samstundis sum nýggju rørini verða løgd, verða eisini stabbarnir, sum halda teimum, stoyptir av nýggjum, eins og nýtt hús verður stoypt har, rørið fer inn í fjallið beint undir Ryskivatni.

Umframt at rørleiðingin verður skift, verður øll tann elektriska og elektroniska skipanin inni á sjálvum verkinum í Botni skift. Her er millum annað talan um fjarstýrisskipanina. Verkið í Botni er nevniliga ikki mannað longur, men verður fjarstýrt frá verkinum í Vági.

Tað er stórarbeiði at skifta slíka rørleiðing úr, sigur Bjarki Hermansen. Talan er um knappliga 700 metrar av røri, sum liggja upp í 230 metra hædd frá sjóvarmálanum. Rørini skulu leggjast, so hallið passar sera neyvt. Til at flyta og leggja hesi rørini hevur SEV nýtt tyrluna hjá Atlantsflogi, og hevur hendan skipan roynst sera væl, sigur Bjarki Hermansen, verkleiðari hjá elfelagnum SEV.

Rørini eru komin til landið liðugt sandblást og málað, og tað er umráðandi at fáa tey so óskadd sum gjørligt upp á pláss. Bjarki Hermansen metir, at um tey vóru flutt eftir jørð, kundi skjótt okkurt komið á tey. Tí er hesin flutningshátturin sera góður at hava at taka til, sigur hann. Hann vísir á, at SEV eisini hevur brúkt tyrluna til aðrar uppgávur, og at hon mangan hevur verið hent.

Samlaði kostnaðurin fyri arbeiðið, sum nú verður gjørt í Botni, fer at liggja um ellivu milliónir krónur, sigur Bjarki Hermansen. Rørleiðingin og tað, sum beinleiðis hoyrir henni til, fer at kosta sjey milliónir, meðan umvælingin inni á sjálvum verkinum fer at kosta fýra milliónir krónur, sigur verkleiðarin hjá elfelagnum SEV, Bjarki Hermansen.

Arbeiðið upp á sjálva rørleiðingina ger norska fyritøkan Møller Energi, sum eisini legði rørleiðingina norðuri á Strond fyri einum tveimum-trimum árum síðan. Tann leiðingin er av júst sama slagi sum hendan í Botni. Annað arbeiði í samband við rørleiðingina, so sum betong og slíkt arbeiði, ger Byggitek, meðan elfelagið SEV sjálvt ger tað elektriska og elektroniska inni á verkinum niðri í Botni.

Tað eru annars tvær rørleiðingar til verkið í Botni. Hendan úr Ryskivatni og so ein úr Vatnsnesi. Tann leiðingin varð løgd í 1965 og sandblást í 1989, sigur Bjarki Hermansen.

Hann sigur, at arbeiðið upp á rørleiðingina ætlandi verður liðugt um hálvan september. Arbeiðið inni á verkininum fer helst at verða eitt sindur drúgvari, men tey vænta tó hjá SEV, at verkið kann fara í gongd aftur, tá rørleiðingin er liðug.



*Rørini, sum veta vatnið til turbinurnar í Botni verða skift út'*
*Mynd: Edvard Joensen*



# Hevur sungið fyri pávanum

*Børn úr Hvítarusslandi eru í hesum døgum í Føroyum og dansa. Eisini duga tey at syngja, tí ein teirra hevur nevniliga sungið fyri sjálvum pávanum*

STEFAN Í SKORINI

Børnini steðga í Føroyum í eina viku, og tey fara avstað aftur við Norrønu mánamorgunin, tá leiðin gongur til Noregs, har tey eisini skulu hava framførslur.

Børnini eru í aldrinum 8-17 ár, og við í ferðalagnum eru 45 børn og 6 vaksin, sum taka sær av teimum og allari útgerðini. Tað er ikki heilt lítið, sum tey hava við sær. Ein buss til flutning og ein lastbil til alla útgerðina hjá teimum.

Tað er fólkadansur úr Hvítarusslandi, sum børnini framføra, og tað líkist eitt sindur russiskum dansi við nógvum beinrørslum og trampi. Tónleikur og sangur eru eisini ein partur av teirra framførslum.

Tey eru ikki heilt eiðasør í sangi, tí ein teirra, kallað Olga, hevur sungið fyri Jóhannesi Páll Páva II. Tað var í mai í ár, tá hon var í Rom og sang fyri hægsta myndugleikanum innan katólsku kirkjuna.

Børnini ganga øll á einum listaháskúla í heimlandinum, har tey umframt ta vanligu skúlagongdina læra at dansa . Hetta er ein skúli, sum eisini tekur fátøk og sjúk børn inn fyri at veita teimum hjálp.

**Tøtt skrá**

Meðan børnini eru í Føroyum skulu tey dansa hvønn dag uttan í morgin, fríggjadagin, sum er frídagur. Skráin, sum løgd er, ber í sær, at børnini eisini ferðast kring landið at vísa fólki síni kynstur sum dansarar og sangarar.

Mánadagin, sum tey komu til Føroyar, vóru tey í Tilhaldinum og dansaðu fyri teimum gomlu har. Týsdagin vóru tey í Klaksvík, har býráðið bjóðaði teimum døgurða, áðrenn Atlantis var karmur um teirra framførslu. Í gjár vóru tey á Giljanesi í Vágunum, men í morgin er eingin dansur á skránni.

Leygardagin tørna tey so til aftur, tá tey skulu hava tvær framførslur. Fyrst verður matiné í Dómkirkjuni, og síðani gongur leiðin inn til Runavíkar seinnapartin. Sunnudagin verður endabresturin í Norðurlandahúsinum, har teirra seinasti dansur verður framførdur.

Tað er Dansifrøði, sum setti seg í samband við Meginfelag Áhugaleikara Føroya, um at fáa børnini hendavegin. MÁF hevur síðani stuðlað ferðini. Ein felagsskapur í Danmark nevndur Diens Mindes Venner, sum eisini hevur ymiskt hjálpararbeiði um hendi, spurdi seg fyrst fyri hjá Dansifrøði, um møguleiki var at senda tey til Føroyar, og soleiðis er henda ferðin komin í lag.

Í Føroyum hava tey verið hýst privat hjá limum í Dansifrøði. Annars halda tey til í B36 húsinum um dagin.






Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út bókina »Kirkjukunnleiki - Arbeiðsbók«, sum Elsa Birgitta Petersen hevur skrivað. Jóhan Kjeld, lærari, hevur teknað myndirnar í bókini.

Ætlanin er, at bókin skal vera stuðul í kristnifrálæruni í skúlanum, har lesiætlanin eisini fevnir um kirkjukunnleika, kirkjubygningar og kirkjusiðir. Arbeiðsbókin er serliga ætlað teimum eldru flokkunum í fólkaskúlanum. Eisini er neyðugt at hava Bíbliuna og sálmabókina við teksti hjá sær.

Hentar orðafrágreiðingar eru aftast í bókini. Alt tilfarið hevur verið brúkt og roynt í undirvísing í fólkaskúlanum.

Hestprent hevur prentað »Kirkjukunnleiki - Arbeiðsbók«, og hon telur 50 blaðsíður og kostar 45 krónur.



# 5 ættarlið

Tað kemur ikki ofta fyri, at fimm ættarlið eru á lívi samstundis, men á myndini eru fimm ættarlið savnað.

Frá vinstru: Oldurabbin Johannes Jacobsen, langomman Jenny Kirke, abbin John Kirke, pápin Reidar Kirke og dóttirin Maria Bodil Kirke Gullbein.

Sunnudagin 6. august gjørdist oldurabbin 90 ár, og honum verður ynskt tillukku.




Opið hús
leygardagin 26. august
kl. 10.00 - 15.00

Í sambandi við framsýningina av tí nýggja NISSAN ALMERA Diesel, hava vit opið hús á Tjaldursvegi. Støkk inn á gólvið hjá okkum og fá eitt prát um bilin ella royn ein túr við honum. Okkara sølufólk eru til reiðar at geva tær alla tað vegleiðing, tú hevur brúk fyri.

NISSAN ALMERA Diesel, hevur størsta dieselmotorin á marknaðinum Óvanliga gott pláss, tríggjar trygdarskipanir, 3 ára mekaniskt garanti, 3 ára lakk garanti og 12 ára rust garanti.

NISSAN

Pf. Meinhardt Arge, Tel 31 61 61, Fax 31 61 60
Tjaldursvegur, 110 Tórshavn
www.nissan.fo